## VALGREINAR

# Hava danir milliardainntøku av Føroyum?



**Jenis av Rana**
*løgtingsmaður f. Miðflokkin*

Alt bendir á, at svarið til yvirskriftina er ja.

Nei, hetta er ikki póstandur tikin úr leysari luft, heldur ikki grundarleys orð frá mær ella Miðflokkinum, men bygt á orð hjá kendum fyrrverandi donskum ráðharra og útrokningum hjá føroyskum embætismonnum.

**Føroyavinurin Uffe Elleman Jensen**

Tað er fyrrverandi danski uttanríkisráðharrin Uffe Elleman Jensen, sum eigur orðini um, at danir ikki goldu tað, teir høvdu lovað, til felags NATO útreiðslurnar (3% av verjuútreiðslunum, sum Anker Jørgensen, statsministari, hevði givið tilsøgn um). Hetta var, sambært Uffa Elleman Jensen, tí at Danmark frammanundan nýtti part av lovaða peninginum til at tryggja frið í Norðuratlanshavi (støðirnar í Føroyum) og í Arktis (støðirnar í Grønlandi).

**Føroyskar útrokningar**

Útrokningar gjørdar yvir tíðarskeiðið 1976-89 vísa, at Danmark spardi 87 mia. krónur hesi árini- sammett við kravið uppá 3%, meðan teir saman tíðarskeið brúktu 58 mia. at tryggja friðin í Norðuratlantshavi og Arktis (blokkstuðulin til Føroyar og Grønland). Tvs. at danir, eftir øllum at døma, hesi árini høvdu ein nettovinning uppá 29 mia. av Føroyum og Grønlandi.

Miðflokkurin hevur biðið um eina frágreiðing

Aftur og aftur hesi 4 árini, enntá á fundi, sum tingmenn høvdu við Anders Fogh Rasmussen, tá hann var og vitjaði, havi eg vegna Miðflokkin biðið um eina uppgerð, sum antin avváttar ella váttar tað, eg skrivi omanfyri. Einasta, eg higartil havi fingið burturúr, hevur verið ein firtnan løgmann og ein vreiðan statsministara.

Mín niðurstøða er tí, at orð Uffe Elleman Jensens og útrokningar embætismanna eru á góðari leið, og hetta stuðlar bert undir ynski Miðfloksins um eina fíggarliga uppgerð við danir.

Niðurstøða Miðfloksins er eisini, at tað var beinleiðis skeivt, fyri at siga tað milt, av landsstýrinum at lækka blokkstuðulin við 367 mió. í ár (eina mió. um dagin). Sjálvandi skuldu teir havt kravt eina fíggarliga uppgerð, áðrenn hetta var gjørt. Ger teirra var óforsvarlig og skeiv og týðir uppá, at vit hava havt menn at stýrt, sum als ikki hava havt førleika til at røkja síni størv.

# Kortini á borðið!

**Heðin Mortensen**
*Løgtingsmaður*



Nú má fáast sjón fyri søgn. Hvør stuðlar alternativari íbúðarbygging?

Tað er stórur tørvur á leiguíbúðum. Fyri ein part til tey yngru, serliga einlig foreldur og lesandi. Fyri ein part til fólk við serligum tørvi vegna brek ella annað. Fyri ein part til tilkomin og eldri, sum ikki hava ráð og umstøður at røkja eini stór sethús longur.

Seinastu tingsetu var lítið at hoyra um slíka íbúðarbygging, og enn minni varð gjørt.

Tað einasta konkreta vóru tvey lógaruppskot, sum eg vegna sambandsflokkin legði fyri tingið.

Annað uppskotið var um rentustuðul. Tað var at seta leiguíbúðir, sum sjálvsognarstovnar útvega, javnt við sethúsaeigarar og geva teimum rentustuðul.

Hitt var um mvg-frítøku. Tað var at geva nevndu stovnum somu mvg-frítøku av arbeiðsløn, sum sethúsini fáa.

Fyrimyndirnar vóru tær konkretu og lidnu ætlanirnar hjá Húsalánsgrunninum og Tórshavnar Kommunu um at byggja bíligar leiguíbúðir á Berjabrekku og eldraíbúðir til dement við Vallalíð.

Niðanfyri eru atkvøðugreiðslurnar í tingmálunum 58 og 59 farna tingárið.

Nú fæst sjón fyri søgn, hvør vil loysa íbúðarmálið!

MVG løgtingsmál nr. 58

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8 | Fólkaflokkurin | | | | | | |
| 1 | Rúna Sivertsen .............. | 15 | Ja | | | | |
| 2 | Jógvan við Keldu ............ | 17 | Ja | | | | |
| 3 | Óli Breckmann ............... | 13 | Ja | | | | |
| 4 | Jógvan á Lakjuni ............ | 12 | Ja | | | | |
| 5 | Jóanis Nielsen ............. | 11 | Ja | | | | |
| 6 | Eyðun Viderø ................ | 10 | | x | | | |
| 7 | Ingi Olsen .................. | 20 | Ja | | | | |
| 8 | Finnbogi Arge ............... | 14 | | | | | - |
| 6 | Sambandflokkurin | | | | | | |
| 1 | Flemming Mikkelsen ........... | 26 | Ja | | | | |
| 2 | Marjus Dam .................. | 31 | Ja | | | | |
| 3 | Alfred Olsen ................ | 29 | Ja | | | | |
| 4 | Heðin Mortensen ............. | 30 | Ja | | | | |
| 5 | Lisbeth L. Petersen .......... | 28 | Ja | | | | |
| 6 | Edmund Joensen .............. | 27 | Ja | | | | |
| 7 | JAVNAÐARFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Katrin Dahl Jakobsen ......... | 23 | | | Nei | | |
| 2 | Jóannes Eidesgaard ........... | 24 | | | Nei | | |
| 3 | Henrik Old .................. | 22 | Ja | | | | |
| 4 | Dan R. Petersen ............. | 21 | | | Nei | | |
| 5 | Vilhelm Johannesen ........... | 16 | | | Nei | | |
| 6 | Kristian Magnussen ........... | 18 | | | Nei | | |
| 7 | Hans Pauli Strøm ............ | 19 | | | | | - |
| 2 | SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Kári P. Højgaard ............ | 2 | | | Nei | | |
| 2 | Helena Dam á Neystabø ........ | 3 | | | Nei | | |
| 8 | TJÓÐVELDISFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Signar á Brúnni ............. | 32 | | | Nei | | |
| 2 | Finnbogi Ísakson ............ | 1 | | | Nei | | |
| 3 | Jógvan Durhuus .............. | 4 | | | Nei | | |
| 4 | Heini O. Heinesen ........... | 5 | | | Nei | | |
| 5 | Hergeir Nielsen ............. | 8 | | | Nei | | |
| 6 | Páll á Reynatúgvu ........... | 9 | | | Nei | | |
| 7 | Annita á Fríðriksmørk ........ | 7 | | | Nei | | |
| 8 | Finnur Helmsdal ............. | 6 | | | Nei | | |
| 1 | MIÐFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Jenis av Rana ............... | 25 | Ja | | | | |
| 32 | Samanlagt ................... | | 14 | 1 | 15 | 0 | 2 |

# Góði veljari, nú er stundin komin til handa

**Bjarni Djurholm**
*Landsstýrismaður Fólkafloksins*



Undirritaði vil virka fyri tær og tínum, so tit náa bestu umstøðum at skapa eina trygga tilveru.

At røkka hesum máli, skal vinnan hava góðar og støðugar karmar í einum samfelag, har eitt sterkt heilsu- og almannaverk og góðir útbúgvingarmøguleikar eru náttúrligir partar av gerandisdegnum.

Málið er sosialt trygt samfelag, har tað er gott hjá øllum at liva, og har tað almenna verjur og tryggjar frælsið hjá tí einstaka, so tú undir persónligari ábyrgd røkkur tinum lívsáhugamálum.

Teimum, sum eru veik og ikki megna at vinna sær til lívsins uppihald, skal verða tryggjað eina góða tilveru.

Viðurskiftini millum Føroyar og Danmark eiga at skipast soleiðis,

- at Føroya Løgting kann gera av, at øll málsøki, undantikið tey, sum eru karmar um ríkiseindina, kunnu yvirtakast sum sermál við teirri fylgju, at Løgtingið gjaldar fyri tær útreið-slur, ið fylgja við teimum,
- - tekur Føroya Fólk avgerð um, at Føroyar skulu vera sjálv-støðugar, koma málsøkini, sum eftir eru, undir føroyskt málsræði.

Ein lagalig og varlig skipan, har eingi óráð verða tikin.

www.djurholm.fo

# Fólkaflokkurin og sjálvstýri Føroya fólks

**William av Vollanum**
*Valevni Fólkafloksins í Norðstreymoy*



Sum smábørn høvdu vit eitt heim at búgva í, vit fingu mat á borðið og klæði at ganga í. Vit lærdu at akta foreldur okkara, og tey lærdu okkum, hvat var rætt og skeivt. Vit byrja at ganga í skúla og læra at lesa, skriva og rokna. Onkuntíð fingu vit eina krónu frá foreldrunum at keypa okkum okkurt góðgæti fyri.

Áðrenn kríggið vóru Føroyar eitt amt í Danmark. Danir stýrdu meir ella minni beinleiðis á lóggávuvaldinum hjá Løgtinginum og í fyrisitingini hjá Landsstýrinum. Danir goldu eisini kostnaðin av at reka hetta lítla samfelagið mitt úti í Atlantshavinum, kanska í minni mun samanborðið við onnur donsk amt.

Sum árini gingu, komu eisini fakini danskt, landalæra og søga inn í lærugreinarnar. Tá vit skuldu hava nýggj klæði, nýggjar leikur o.t, sluppu vit at velja sjálvi, hvat tað skuldi verða, men tað vóru foreldrini sum goldu. Sjónarringurin verður størri og vit skilja betri, hvussu samfelagið virkar.

Í 1948 verður Heimastýrislógin sett í gildi. Føroyingar fáa fríðari ræsur á lóggávuvaldinum og í fyrisitingini. Sum árini ganga verða fleiri og fleiri málsøki yvirtikin, danir gjalda tó beinleiðis fyri tey ymisku málsøkini tey fyrstu árini. Seinni fáa vit so heildarveitingina (blokkstuðulin), har Føroyingar sjálvir sleppa at ráða yvir hvussu peningurin til tey ymisku málsøkini verður deildur.

Skjótt gongur tíðin og áðrenn vit varnast er skúlatíðin liðug. Vit finna okkum eitt arbeiði og byrja at vinna okkum pening. Peningin ráða vit sjálvi yvir, og vit taka tað sum eina sjálvfylgju, at vit sjálvi gjalda fyri privata nýtslu. Vit leggja pening til síðis við tankanum um at fáa føtur undir egið borð. Enn búgva vit heima hjá foreldrunum, men sum árini eru gingin, er tann peningaliga útreiðslan av at hava okkum búgvandi heima minkað munandi.

Aftaná eina djúpa kreppu í 90´unum, hevur tað, tey seinastu fýra árini, gingið gott peningaliga í Føroyum. Við nógvum fiski á landgrunnunum, høgum fiskaprísum, góðum afturgjaldstreytum av skuldini til danir, og betri handilssáttmála við ES, hava vit fingið høvdið uppundan vatnskorpini aftur. Ja, tað hevur gingið so væl, at vit seinastu árini hava havt eitt landskassaavlop uppá nærum 600 mió. kr. árliga.

Fyri fyrstu ferð í søguni, hevur eitt Landsstýri lækkað heildarveitingina frá dønum. Veitingin minkar við 356 mió í 2002, og er samsvarandi við tey málsøki, sum eru yvirtikin. Eftir nógva togan aftur og fram við donsku stjórnina og partvís eisini við føroysku andstøðuna, hevur tað eydnast Landsstýrinum at leggja sjálvstýristilgongdina í eina trygga legu. Málið vit hava sett okkum er 1. jan. 2012. Tá skulu vit hava yvirtikið øll málsøki, undantikið timum, ið knýta seg beinleiðis at fullveldistøku, samstundis sum heildarveitingin minkar tilsvarandi.

Eftir lokna útbúgving og við hampuligari uppsparing, eru vit klár til at fáa okkum egið tak yvir høvdið. Farið verður í bankan fyri at fáa lán, og útrokningar verða gjørdar. Tað er nú, tað umræður at hava upparbeitt sær eitt so gott grundarlag sum møguligt. Er inntøkan nóg stór til at vit klára at svara hvørjum sítt?. Er uppsparingin nóg stór til at standa ímóti við, um nakað óvæntað skuldi hent?. Jú, so sanniliga, bankin játtar lánið og skrivað verður undir. Endiliga fáa vit okkara egna, nú eru tað vit sum leggja karmarnar, og vit sum taka avgerðirnar, og ikki minst vit sum gjalda fyri útreiðslurnar.

Tá komið er til 1. jan. 2012, eru tað Føroya fólk sum skulu avgerða, um Føroyar skulu skipast sum eitt fullveldisríki. Verður tað eitt Ja, so fylgja málsøkini uttanríkismál, verjumál, ríkisborgararættur og gjaldoyramál við í yvirtøkuni og sjálvsagt eisini útreiðslurnar av hesum. Hesi mál eru rættuliga stór og tung mál at umsita og tey kosta nógv. Tað er tí sera umráðandi, at vit hesi árini framm til 2012 fáa arbeitt upp okkum eitt so gott grundarlag sum møguligt, tá talan er um vinnuna, tað peningaliga og í vitanini á øllum málsøkjum.

Vit menniskju eru so ymisk, tað eru nøkur, sum búgva heima hjá foreldrum sínum alt lívið, har eisini foreldrini gjalda fyri megínpartin av útreiðslunum.

Onnur velja at búgva heima hjá foreldrunum, tað kann verða í einum kamari ella einari íbúð í kjallaranum, men gjalda sjálvi fyri egna nýtslu og kanska eitt sindur afturat.

Nøkur velja at flyta heiman frá uttan at hava nóg gott grundarlag fyri einaferð at fáa egið tak yvir høvdið.

Tey flestu hava eina tráan eftir at fáa sítt egna, sjálvt eftir at hava havt ein so góðan uppvøkstur, at ikki kann setast fingurin á nakað sum helst.

Tað er hendan bólkin, eg havi roynt at samanborðið sjálvstýris tilgongdina hjá Landsstýrinum við og er tað eisini hesa tilgongdina, sum Fólkaflokkurin fer til val uppá.

Gott val

# Reiðrið

**Eilif Brimheim**
*Valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy*



Einaferð var tað eitt starapar, ið fegið vildi seta búgv og reiðrast.

Reiðrið bleiv bygt av hoyggi og strá og tí tilfari, ið nú finst.

Nógv var at gera bara at fáa alt hetta upp at standa hjá staraparinum.

Parið nørdist og bøgan varp fimm egg. Tað vísti seg, at ein geykabøga uttan úr heimi - allarhelst flytifuglur - kom og varp sítt egg í reiðrið. Hetta meðan starparið var so upptikið við reiðurtilfarið. Nú vóru so seks egg.

Eggini klaktust og seks ungar komu út.

Tann eini ungin var nakað matglaður og framligur - vit nevna hann Iló - honum dámdi best í høgru síðu av reiðrinum, har mundi vera nakað nógv av æðudúni. Hann át nakað nógv eins og geykaungin. Fekk so búkilsku og fekk ikki útviklað seg rætt. Sum ítriv hevði hann eisini útvegað sær reiðurtilfar til hálsprýði, og hóast tað hevði skap av veingjum, kundi hesin ikki flúgva.

So var tað ein annar ungi - vit nevna hann Sennaói - sum helt, at maturin og tilfeingið skuldi fordeilast so væl og gloymdi heilt at eta. Hann var eisini rættuliga upptikin av at rætta uppá hinar ungarnar. Sat í vinstru síðu av reiðrinum og togaðist um reiðratilfarið við ungan høgrumegin. Hann mentist so ongantíð.

Tíðin gekk, og tann eini ungin - vit nevna hann Ingøh -kendi eina slíka trongd at flúgva. Hann hevði eisini lisið um brøðurnar Wright, men veingirnir vóru ikki heilt útviklaðir enn. Men ikki kundi hann bíða, flaksaði dúgliga við veingjunum, so fjaðrarokið stóð frá. Setti av, men hvat, hann bara datt og kom ongantíð fyri seg.

Tann eini ungin - nevndu Sinej - var eitt sindur spakur, visti ikki rættuliga hvat hann vildi. Av og á át hann. Hann helt seg mest til miðjuna av reiðrinum, visti ikki rættuliga, hvønn veg hann skuldi venda.

Geykaungin - nevndur Htebsil - skavaði kanska nakað nógv til sín og nálgaðist uppi í hjá foreldrunum. Hann fleyg so ein dag frá reiðrinum, hugdi ikki afturum seg, men vit vita tó, at hann finnur bara eitt nýtt reiður næsta ár at verpa sítt egg í.

Nú mundi eg gloymt tann eina ungan. Hann vaks, menti seg, og tá tíðin var búgvin, segði hann foreldrunum farvæl og tøkk fyri og setti kós móti tí nýggju verð.

Jú, starin er so vorðin!

# Landskassans úrslit áðrenn avdráttir

**Edmund Joensen**
*løgtingsmaður Sambandsfloksins*



Í 1998 var yvirskotið hjá landskassanum 470 mió. krónur. Loysingarlandsstýrið kom sostatt til búgvið borð.

Síðani helt yvirskotið fram í trý ár, men nú landsstýrið eftir fýra árum leggur frá sær, er aftur hall á løgtingsfíggjarlógini.

Sí talvu!

Landsstýrið roynir at billa fólki inn, at hetta landsstýrið hevur skapt yvirskotið í landskassanum, men talvan omanfyri prógvar tað øvugta.

Vit hava størstu inniløguár, sum nakrantíð hava verið í Føroya søgu. Tí má tað roknast sum búskaparligur ørðskapur við lít, at løgtingsfíggjarlógin vísir hall.

Rakstrarútreiðslurnar eru hækkaðar við umleið einari milliard krónum, og nú landsstýrið leggur frá sær, hava teir minkað ríkisveitingina við umleið 400 mió. krónum.

Ella við øðrum orðum hevur loysingarlandsstýrið sent eina samlaða rokning til allar føroyingar uppá 1.400 mió. krónur um árið framyvir.

Sleppur landsstýrið at halda fram, so hava teir eisini samtykt at halda fast við sama politikkin. Í 2012 eigur tú alla rokningina. Tá skal vera klárt at loysa.

Minnist til hetta á valdegnum.

